# Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

**Spyrjari:** Súsanna Bertholdsen, løgtingskvinna

**Svarari:** Sirið Stenberg, landsstýriskvinnu í almanna- og mentamálum

**Evni:** Hjálp til fíggjarliga sperd húski

**Spurningar:**

1. Hvussu nógv húski fingu familju- og hjálparískoyti í sambandi við inflatiónshjálpina, sum Løgtingið samtykti fyrr í ár?
2. Hvørjum loysnum arbeiðir landsstýrið við fyri at lætta um hjá fíggjarliga sperdum húskjum?
3. Er ætlanin at gera nakað við stóra bráðfeingis tørvin á fíggjarligari hjálp í løtuni?

Rentur, húsaleiga og matvøruprísir eru ógvuliga nógv hækkað og hetta merkist allastaðni. Tað sansar veruliga at og neyðugt er at handla skjótt, so fólk kunnu fáa ein lætta í ár. Veturin og jólini stunda til, og nógvar familjur vita ikki síni livandi ráð.

Tað er ikki dagur, at onkur ikki rópar neyðarróp í sosialu miðlunum, tí tey ikki vita síni livandi ráð. Bankakontan er á minus, mánaðurin er bert komin í helvt, og tey eiga ikki pening fyri mat. Tey biðja alment um hjálp í vón um, at onkur forbarmar seg yvir tey og rættir eina hjálpandi hond.

Hjálparfelagsskapir hoyra hvønn dag frá fólki, sum ikki eiga fyri mat, og støðan er hættislig.

Fyrr í ár samtykti Løgtingið ein hjálparpakka, har øll húski – bæði barnafamiljur, fólkapensjónistar og onnur – kundu søkja um eingangsstuðul á 12.000 kr sum hjálparískoyti. Harumframt hækkaði familjuískoytið við 750 kr. um mánaðin fyri hvørt barnið í tíðarskeiðinum frá juni og restina av 2023. Kortini mugu vit staðfesta, at tørvur framvegis er á hjálp til fíggjarliga sperd húski.

**Á Løgtingi, 24. oktober 2023**

Súsanna Bertholdsen